

*Jóhanna av Steinum lænir Annu Nygaard klæði og fær á tann hátt reklamu.*

# Tað lønar seg at lata tey kendu í

VIT KENNA TAÐ FRÁ JAMES BOND OG SEX AND THE CITY – MERKI OG KLÆÐI VERÐA VÍST, OG VIT HYGGJARAR VERÐA ÁVIRKAÐ AT KEYPA JÚST HESI TINGINI. SOKALLAÐ »PRODUCT PLACEMENT« ER VANLIGUR HÁTTUR HJÁ FYRITØKUM AT GERA SEG KENDAR Á EIN SNILDAN HÁTT.





MYNDIR
**Inna Tørnroos**
inna@sosialurin.fo

Í Føroyum verður tað eisini nýtt. Seinasta dømi er Anna Nygaard frá X Factor, ið er ílatin klæðini hjá sniðgevanum Jóhonnu av Steinum.

– Anna hóskar væl til míni klæði. Hon er ung og dugnalig og í ferð við at byggja sær eitt image, sigur Jóhanna av Steinum.

Hetta er ikki fyrstu ferð, Jóhanna lænir klæði út til fólk. Vanligt er tó, at tey koma til hennara og antin keypa ella læna klæðini.

– Eg hevði ynskt at sloppi at klætt ein mann, tí tað er tað nýggjasta eg fáist við júst nú, sigur hon.

At tað skal vera rættur persónur og samanhangur, har klæðini síggjast, er týdningarmikið fyri tey, ið nýta »product placement«.

Ein tann besti persónur at lata í er poppdrottningin Madonna. Tá ókendi svenski smúkkusniðgevin, Efva Attling, gav vini sínum Johan Renck tvær smúkkur, sum hann kundi geva Madonnu, var hennara lukka gjørd. Madonna fór í smúkkurnar í einum sjónbandalag, og ein eftir ein byrjaðu Hollywood-stjørnurnar at nýta smúkkurnar. Nú er merkið Efva Attling kent um allan vesturheimin.



*Efva Attling gjørdist heimskend, tá Madonna nýtti hennara smúkkur.*

Jóhanna av Steinum væntar sær ikki, at allur heimurin letur seg upp av klæðunum, sum Anna Nygaard er í.

– Tað er bara gott at síggjast eitt sindur, eftirsum tað er so stutt síðani eg byrjaði, sigur hon.

## INNIHALD

4 REPORTASJA: **MIÐLARNIR UM FØROYSKA MÓTAN**
6 TIPS: **VAKURT Á VEGGJINUM**
8 90 SEKUND: **GUÐRUN RÓGVADÓTTIR**
10 SAMRØÐA: **RÓAR HANSEN UM LÍVIÐ VIÐ VØDDASVINN**
12 TIL ARBEIÐIS: **GRY STARVAST SUM KONDITTARI**
13 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
14 GREINARØÐ: **KALDA KRÍGGIÐ**
16 REPORTASJA: **TÓNLEIKAÁRIÐ**
17 UMMÆLI: **KONSERTIN HJÁ HANUS**
18 SPYRST SO LIVST: **RIGMOR SVARAR**
19 MÍN BESTA UPPSKRIFT: **HAKKIBÚFF VIÐ BACON**
23 TAÐ HENDUR: **KONSERTIR, BØKUR, SENDINGAR osfr.**
24 VIKUMYNDIN: **BESTA MYNDIN Í VIKUNI**

# Nú vóru øll annars so glað ...

KLUMMA
**Anna Ellingsgaard**
anna@sosialurin.fo

Eg veit ikki, um starvsfólkini í Føroya størstu kommunu vóru einsamøll inni tann dagin, tey settu seg at spæla við eina nøgdsemiskanning fyri at vita, hvat hendi. Ella vildu tey bara gera kommunupápan glaðan, tí í stóru kommununi skuldu øll vera glað. Og tí helt onkur, at foreldrini í kommununi skuldu sleppa at fortelja, hvussu glað tey vóru fyri stovnarnar, har teirra børn blivu ansað.

Eg giti, at foreldrini vóru ordiliga stolt av at verða eftirspurd. Og á miðlunum gjørdu tíðindafólkini stór eygu, tá kommunan fortaldi um fína listan yvir, hvussu glað foreldrini vóru. Nakað fínur mundu hann vera, tí hann kostaði 200.000 krónur fortaldi kommunan.

Hetta var nemliga ein modernað kommuna, sum legði doyðin á at øll skuldu vita, hvat kommunan ger. Soleiðis var lógin í landinum, fortaldi kommunan, og vísti tíðindafólkunum tað minsta og glaðasta petti av fína listanum og koyrdi restina í lumman.

Tíðindafólkini kundu jú heldur ikki vita, at kommunan hevði lovað, ikki at siga tað fyri nøkrum, at summi foreldur ikki vóru so glað fyri ansingarstovnin. Men so blivu tíðindafólkini firtin og mintu á, at kommunur ikki máttu bróta lógina. So mátti kommunan slatra allíkavæl, og so blivur ansingarstovnarnir niðast á listanum keddir.

Alt tað skrivaðu tíðindafólkini, tí tey noyðast eisini at siga sannleikan. Tí situr fryntliga kommunan nú og lúnast í einum króki og sigur, at tíðindafólkini eru drøj og hava misskilt alt. Nú heldur kommunan nemliga slett ikki allíkavæl, at foreldrini hava forstand uppá, hvussu góðir ansingarstovnarnir hjá børnunum eru.

Eg veit ikki um kommunan torir at fortelja tað fyri foreldrunum, tí so blíva tey heilt sikkurt øgiliga kedd.

Og kedd fólk høvdu eisini bara spilt spælið hjá kommununi, sum dámar so væl at spæla við nøgdsemiskanningar. Serliga um hon fær tað tað hugskot at kanna, hvussu væl borgararnir halda at kommunan dugir at gera nøgdsemiskanningar.



VIKUSKIFTI
**Redaktørar:** Inna Törnroos og Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Eivør Pálsdóttir / Beinta Haraldsen